# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



## Litmyndir av brúðarpørum hvønn fríggjadag

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í blaðið hvønn fríggjadag í litum.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsanir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er mikudag kl. 12.00

**Sosialurin**

## Minningarorð um mína elskaðu mammu,
# Thurid Andreasen
### f. 22.10.1919 d. 03.08.2004

Nú nærkast jólum, og eg sakni teg so nógv, góða mamma. Tú vart mín sólstrála.

Tað var so gott at koma norð á Kósina, har sum okkara barnaheim stendur; tú vart altíð so glað, tá tú sá okkum, og har var so fjálgt at koma inn. Altíð komst tú við einum drekkamunni beinanvegin, so fórt tú at vísa okkum, hvat tú hevði keypt og bundið til jólar.

Góða mamma, tú gloymdi ongan, tað vóru nógvar hosur og skóleistar bundnir til jólagávur, og tú vart so gávumild. Tað síðsta árið áðrenn tú bleivst sjúk, hevði tú bundið út ímóti 40 pør av hosum og skóleistum til sjómenninar.

Eg hugsi mangan um, hvussu stuttligt og hugnaligt tað var, tá man kom norður á Kósina, tá tú setti teg at lesa jólakortini, tú hevði fingið.

Tú vart altíð klár at hjálpa. Tá eg bleiv sjúk í 2002, vart tú altíð hjá mær, og sjálvt um tú ikki var so væl



fyri sjálv, so komst tú heim at vitja meg kortini. Eg minnist mangar góðar løtur, sum tú vart hjá mær, og takk skalt tú hava fyri tað.

So bleivst tú sjúk sjálv, góða, men tú vart so tolin. Sjálvt um tú ikki fekk gjørt so nógv, so vart tú altíð í góðum lag. Eg plagdi at lesa og syngja fyri tær, og so bóðu vit til tann livandi Gud.

Góða mamma, tú vitsti eisini, hvat tað var at missa. Tú misti Gimma beiggja í 1969 og pápa í 1992. Eisini misti tú elsta ommusonin, Pól Eyðfinn, í 1999, so tú merkti eisini sorg, men lærdi at leggja alt í Harrans hendur, sum tit settu tykkara álit á.

Elskaða mamma, eg vil takka tær fyri alt tú hevur verið fyri okkum. Ein dag møtast vit aftur ,og tá verður eingin sorg og eingin pína.

Hvíl í friði, góða mamma.

At enda vil eg takka Lis, Hansinu og Bjarnhild fyri, at tit gjørdu tað møguligt at mamma kundi verða í heimi sínum til hon andaðist. Stóra takk.

**Thomina v. familju**

**Dagurin**

**17. desember. Albina,** deyð umleið ár 250. Ung kvinna, sum varð tikin av døgum, tá ið Decius keisari ráddi.

## Minningarorð um
# Birgir Nónsgjógv

*Sárt kennist sakn um bygd og oyggj,*
*Vinir, teir harmast um landið;*
*Sárt syrgja tey faðir, mann og son,*
*Hann íð lagnan nú rændi.*
*Styrki hin Hægsti, hvønn sum her*
*Misti ta størstu ogn í verð.*
*Signing við tínum minni !*

Birgir kom eitt sindur óvæntað inn í familjuna. Umdømi hansara leyp framman fyri honum, og søgdu øll, eg møtti, at tað var ein framúr skilamaður, ið systirin hevði fingið.

Óansæð við hvørjum fyrivarni hetta bleiv móttikið, so skuldi tað skjótt vísa seg, at Birgir vann álitið og respekt frá allari familjuni beinavegin. Serliga hansara atburður yvir fyri børnunun hjá Elisabeth var fyrimyndarligur.

Tað var ein frøði at vera saman við Birgiri. Hann var altíð í góðum lag. Hann var nærverandi, og hann lærdi okkum at vera opin fyri sær og okkum sjálvum. Hann var tolin og góðlintur, tað var ongantíð eitt



øvugt orð frá honum. Fyrimyndarliga mansligur, samstundis sum hann var kensluborin.

Birgir hevði listagávur og var dugnaligur handverkari. Alt var so snøgt og væl úr hondum greitt, annaðhvørt tað var inni ella úti. "Tað skal gerast ordiliga" segði Birgir altíð. Hann var foreldrum sínum ein góður sonur. Altíð klárur at taka hond í hjá teimum, um tørvur var á tí.

Tað var gott at síggja hvussu gott Elisabeth og Birgir høvdu tað saman. Hann var Elisabeth ein góður maður og øllum børnunum ein góður pápi. Tað er óiva teim fægstu unt at uppliva eitt sovorðið hjúnalag. Børnini hjá Birgir úr fyrru giftu, og børnini hjá Elisabeth eru sum systkin.

Birgir var so glaður tá hann, fyri trimum árum fekk samband við systkini í Klaksvík. Hann tosaði altíð um hvussu gott tað var.

So ringt tað er at hava mist Birgir. Vit vilja minnast hann við tøkk fyri at hava fingið loyvi til at liva so tætt uppat einum so stórum menniskja.

**Meinhild**

# Tøkk

Familja, vinir og kenningar!
Eg vil við hesum takka hjartaliga fyri tykkara vitjanir, fjarrit, samrøður, gávur og blómur tann 25. november 2004. Dagurin, tit gjørdu so hugnaligan og minnisríkan.

Gleðilig jól og eitt Harrans signað nýggjár.

*Bestu heilsanir*

**Fredrik Jacobsen**
**Klaksvík**

# Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymsan hátt mintust meg á 85 ára degnum, takki eg hjartaliga.

**Dánjal Pauli Danielsen**
**í Búðini**